stuðulskonsert og dansur



fríggjakvøldið 20. august
konsert á platform kl. 21.00
kári p
hanus g. johansen
terji rasmussen
sámal & ronnie - martin joensen - deja vu
finnur & ronnie (páll finnur páll)
dansur á platform kl. 01.00
all that rain
kostnaður 100 kr
peningurin fer til uttanlandsferð hjá børnum við krabbameini
atgongumerki kunnu keypast í forsølu í kunningarstovuni
PLATFORM discoteque
FFK føroya felag móti krabbameini
Sosialurin





*Høllin í Kollafirði er nú reist, og vónin er, at tað longu undan jólum skal bera til at spæla dyst*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Reisigildi í Kollafirði

**Vónin er, at tað longu undan jólum skal bera til at spæla hond- og flogbólt í nýggju ítróttarhøllini**

REISIGILDI
*Jákup Mørk*

Tað hevur tikið sína tíð, og í øllum førum munnu tey í Kollafirði halda, at tað nú er nokk tosað um at byggja ítróttarhøll í bygdini.

Longu tá samanleggingin við Tórshavnar Kommunu varð veruleiki, skuldi arbeiði verið farið ígongd, men av ymsum ávum hevur hetta alla tíðina drigið út.

Í ár er tó verulig ferð komin á málið. Ein lokalur bólkur varð settur, sum í tøttum samstarvi við Býráðið skuldi fyrireika alt arbeiðið, og síðani hevur gingið skjótt.

## Fegin formaður

Og tað er einki at dylja, at tað er ein fegin Heðin Mortensen, sum nú kann staðfesta, hvussu væl arbeiðið nú er komið áleiðis.

Ikki minst tykist hann leggja dent á, at kollfirðingar við nýggju høllini ikki bara fáa eina ítróttarhøll, men ein savningardepil fyri alla bygdina, har tiltøk av alskyns slag kunnu hýsast.

– Hartil verður hetta eisini gjørt sum ein partur av skúlaútbyggingini, og tá alt hetta er liðugt, so skuldu kollfirðingar havt ein skúla, sum fult og heilt livir upp til tey krøv, sum nýggja fólkaskúlalógin fyriskrivar.

Kostnaðurin av høllini verður mettur til at liggja um 15 mió kr., men hóast hetta kann tykjast nógv, so er einki sum bendir á, at hetta verður seinasta høllin í kommununi í hesum umfarinum. Í øllum førum tykjast tankarnir hjá formanninum í byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini at venda tann vegin, at ein ítróttarhøll á Argjum/Vesturbýnum verður tað næsta á skránni.

# Alment ítróttarskeið í Pilates

**Havnar Fimleikafelag skipar fríggjakvøldið og leygardagin fyri skeiði í Pilates**

FIMLEIKASKEIÐ
*tíðindaskriv*

Málbólkurin til hetta skeið, er ógvuliga breiður. Øll, ið fáast við ítrótt, melda til, taka sær venjingarklæði við og møta í høllini á Stórheyggi kl. 17 fríggjadagin 27. august.

## Pilates í grundvenjingini

Skipanin við strekkingar- og styrkivenjingum eru nevndar eftir Joseph H. Pilates og er eldri enn 90 ár. Venjingarnar styrkja vøddarnar, geva betri kropsburð og venja fimi og javnvág. Vant verður standandi, sitandi ella liggjandi, við ella uttan amboðum - har serligur dentur verður lagdur á kropsmiðjuna: Búkin og ryggin.

Upprunaliga vóru mest fimleikarar og dansarar, ið nýttu hesa venjingarskipan, men nú er skipanin innan mestsum alla venjing - og til allar aldursbólkar - eins væl og uppvenjing. Orsøkin at Pilates hevur vunnið seg fram, er serliga tí at venjingarnar kunnu nýtast bæði fyribyrgjandi og uppbyggjandi, samstundis sum Pilates kann bæði standa einsamøll í venjingarskránni, ella verða sett saman við øðrum venjingum.

Sum dømi kann nevnast, at landsligið í rugby í New Zelandi, nýtir Pilates sum part av teirra venjingum - fyri at fáa betri innari stabilitet og harvið meira styrki.

Týdningarmikið er, at ítróttarfólk geva sær far um styrkivenjingar og fyribyrgjandi venjingar longu í fyrstu ítróttarárunum. Harvið kunnu tey sleppa sær undan skaðum og harvið fáa møguleika at íðkað ítrótt í longri tíðarskeið.

## Vælvandur instruktørur

Hetta er fyrsta ferðin, at alment skeið verður skipað innan hesa venjing her á landi, og hevur Havnar Fimleikafelag fingið Hannu Dalsgarð at undirvísa.

At lýsa fyrimunirnar, nú Hanna Dalsgarð er komin at undirvísa, verður fyrst víst á hennara bakgrund innan kappingar-fimleik. Síðani hevur hon eisini dansa nýmótan dans, m.a. á Marie-Brolin Danse Teater í Århus og Northern school of Contemporary Dance í Leeds og fingið prógv sum Bachelor of Performing Arts with Honours in Contemporary Dance 2002.

Afturat hesum, hevur hon íðkað Pilates í fleiri ár. Í 2002 varð hon útbúgvin Pilates instruktørur í Body Control Pilates. Eisini hevur hon verið á skeið, har Rachel Holmes (Nike Athlete) hevur undirvíst. Hanna Dalsgarð undirvísir í Pilates, Dability Ball (swissball) og í spinning. Hun er knýtt at Spirithouse í Keypmannahavn og letur í oktober upp egin høli í Keypmannahavn.

# Klaksvíkin aftur á kortið

**Í kjalarvørrinum av stóra Summar Festivalinum, fara klaksvíkingar nú at halda ítróttarnátt**

ÍTRÓTTARNÁTT
*tíðindaskriv*

Ætlanin við slíkari Ítróttarnátt er, at feløgini bæði innan ítrótt og frítíð, fáa møguleikan fyri at vísa seg fram, umframt at vanligi áskoðarin, fær høvði til at royna hendan ítrótt, ella frítíðarfelagsskap. Soleiðis fáa tey, sum hava hug, møguleika at sigla við bátum, skógva og stigla hestar. Kappróður og frælsur ítróttur eru eisini á skránni, eins og fimleikur og badminton eru tað. Og sjálvandi skal fótbólturin eisini hava sítt pláss, nú KÍ fyllir hundrað, og her verður kappast í kynstrunum at skjóta brotsspørk og at jonglera.

Kvøldið byrjar kl 18.00, tá ið skrúgonga fer frá býraðshúsinum og niðan á vøllin við Djúpumýru, har borgmeistarin Steinbjørn O. Jacobsen og sparikassastjórin Eyðfinn Reyðberg, seta Ítróttarnáttina. Við í sjálvari skrúgonguni eru sjálvandi ítróttarfólk, brandbilur, Silvi og onnur.

Ítróttarnáttin endar við felagssangi og suppu í KÍ-høllini um miðnáttarleitið.